

*Høgh, marinuovasti, sum metti málið um Acadian Searcher so álvarsligt, at hann láta skipið fara út um markið aftur við tí fyri eygað, at spurningurin tá kundi takast upp á hægsta politiska stigi. Nú endaði tað so við eini semju um, at skipið einki ólógligt hevði gjørt. Mynd kalmar*

***Danska uttanríkismálaráðið um Acadian Searcher:***

# Innan fyri mark men gjørdi ikki kanningar

Tað tók eina góða viku hjá danska uttanríkismálaráðnum at loysa málið við Acadian Searcher, sum næstseinasta fríggjadag varð tikin fyri at hava gjørt seismiskar kanningar inni á føroyskum øki.

Nógv diplomatiskt virksemi hevur verið í Keypmannhavn og hava telefonirnar gingið heitar millum uttanríkismálaráðið, Forsvarskommandoen, bretsku sendistovuna og landsstýrið.

Endin á hesum máli bleiv so tann, at einki mótmæli verður latið bretum. Tvørturímóti ger uttanríkisráðið vart við, at Acadian Searcher gjørdi ikki kanningar á føroyskum øki. Tað er rætt, at skipið var innan fyri mark, men tað var bert fyri at venda.

Skrivið er soljóðandi:

**Britisk efterforskning i Sokkelområdet mellem Færøerne og UK**

På baggrund af de hændelser, der inden for den sidste uge har fundet sted i forbindelse med britisk kommerciel efterforskning (seismisk aktivitet) i sokkelområdet mellem Færøerne og UK har Udenrigsministeriets Direktør d.d. haft en samtale med den herværende britiske ambassadør.

Om den nylige hændelse, hvor forskningsskibe med britiske tilladelser foretog seismiske undersøgelser i sokkelområdet mellem Færøerne og UK, blev det under mødet klarlagt, at de pågældende forskningsskibe havde tilladelse til efterforskning inden for det af UK udpegede sokkelområde, d.v.s. uden for det dansk udpegede område. Imidlertid sejlede et af skibene ind i dansk/færøsk område. Det britiske efterforskningsselskab har gennem de britiske myndigheder forsikret om, at skibet alene foretog en vending, og at der ikke foretoges seismiske målinger i området. Der er således klart, at de britiske tilladelser **ikke** omfatter og ikke kan omfatte dansk udpeget område.

Den næste runde i forhandlingerne om sokkelafgrænsningen skal finde sted i London i begyndelsen af oktober. Såvel fra dansk som britisk side forventes forhandlingerne at blive lige så positive og venskabelige som under den seneste runde i oktober 1992.

**Udenrigsministeriet, den 3. september 1993**

## Nýtt Málting





46 MALTING 2/93

Tey tíggju málboðini

– eftir Finn Erik Vinje

Málting nr. 8 er komið. Í blaðnum hesa ferð er m.a. grein, sum viðger staðanøvn við *vík*. Greinin byggir á tilfar úr Staðanavnasavni Føroya Løgtings. Spurt verður, hví summi nøvn hava formin *víkar*, sum í *Víkarhagi*, meðan onnur hava formin *víks*, sum í *Hoyvíksgjógv*, og høvundurin kemur við einari áhugaverdari loysn. Í blaðnum er eisini ein teigur undir heitinum »Spurt og svarað«, har lesarar spyrja um ymisk málslig fyribrigdi. Hildið verður fram við upprunafrøðiliga fólkanavnalistanum, sum ætlanin er skal vera fastur táttur til komið er á mál. Ein grein er um málrøkt, málplanlegging o.a., har høvundurin ger vart við, at málfrøðingar mugu góðtaka nútíðartalumálið, heldur enn alíuð at siga, hvussu fólk skulu ella eiga at nýta sítt egna móðurmál, og úr Finnlandi er komin grein, sum stutt og greitt lýsir finska málið. Eisini eru lesarabræv og ummæli av bókunum »Hugin og minnið« og »Ein ferð inn í føroyskt« í Máltingi hesaferð.

Málting kemur nú út á triðja ári. Tað kemur tríggjar ferðir um árið og haldaragjaldið er 125 kr árliga. Millum tey evni, ið fyrr hava verið í tíðarritunum, kunnu nevnast greinir um málrøkt, greinir, ið hava viðgjørt bygdamál, meginreglur í orðabókargerð, greinir um fólkanøvn, staðanøvn o.a.

Haldarí kunnu tygum gerast við at skriva til Málting, postsmoguu 1220, 110 Tórshavn.

Bygdarhúsið í Hósvík

Bygdarhúsið í Hósvík verður leigað til ymisk endamál, s.s. bingo, brúdleyp, veitslur, fundarvirksemi o.m.a. Borðreiðast kann fyri uml. 300 fólkum. Fáið nærri at vita við at ringja

tlf. 22368

Blindastovnur Føroya

hevur opið mánadag–fríggjadag kl. 9–16.
Telefonir: 18222 og 19288.

MUSIKK-HEILSØLAN
Tlf. 075 833626
Fax. 075 837424

Vit tryggja tær lægstu prísirnar á øllum musikktólum.

- Størsta úrvalið
- Besta tænasta
- Bert nýggjastu sløgini
- og nógv biligast !